# Gjaldskipanin ongantíð royndarkoyrd

**Gjaldskipanin hjá Vágatunlinum varð ikki royndarkoyrd, áðrenn hon var uppsett, og virkar framvegis ikki. Einir fjúrtan dagar ella so fara helst at ganga afturat, áðrenn gjaldast kann við korti**

TUNNILSGJALD
*Edvard Joensen*




*Gjaldskipanin hjá Vágatunlinum varð ikki royndarkoyrd, áðrenn hon varð uppsett. Stórir trupuleikar hava alla tíðina verið, síðan latið varð upp, og framvegis verða rokningar skrivaðar við hond til teirra, sum koyra gjøgnum tunnilin*
*Mynd: Edvard Joensen*

Partafelagið Vágatunnilin var í tíðarneyð, tá gjaldskipanin varð uppsett, og tí varð hon ongantíð royndarkoyrd, áðrenn tunnilin varð latin upp. Hon virkar ikki enn, nú ein mánað eftir, at latið varð upp.

Skipanin varð umbiðin til at seta upp til ta tíð, tunnilin skuldi verða liðugur eftir upprunaligari ætlan. Tað vil siga einaferð í summar, sigur Reinhold Isaksen av skrivstovuni hjá Vágatunlinum.

Tá so gjørt varð av at lata tunnilin upp fyri jól, varð biðið um at fáa skipanina fyrr enn ætlað.

Hóast tað var trongligt, bar tað framleiðaranum til at lata eina skipan, sum tó ikki varð royndarkoyrd, áðrenn hon varð uppsett.

Allir teir trupulleikar, sum nú eru, mugu tí rættast, samstundis, sum bilarnir koyra gjøgnum tunnilin. Og tað merkist sjálvandi hjá teimum, sum brúka tunnilin.

Tó virkar frádráttarskipanin, teir sonevndu kubbarnir. Í hvussu er viðhvørt.

Hinumegin teljaran, har teir bilar, sum ikki hava kubba, koyra ígjøgnum, er aftur í móti so sum so.

Av og á ber til at trýsta á knøttin, sum gevur tær rokning at gjalda seinni. Men meira enn so er eisini neyðugt hjá vaktarfólkunum, sum trúliga hava staðið við støðina, síðan latið varð upp, at skriva rokningar við hond.

Reinhold Isaksen sigur, at væntandi fer tað at taka í hvussu er einar fjúrtan dagar, áðrenn skipanin er fingin at virka til fulnar. Tað vil siga, at fólk kunnu gjalda við korti við sjálva gjaldstøðini.

Talan er um ymsar trupulleikar í samskiftinum við PBS, sum skal umsita skipanina, sigur hann.

Á skrivstovuni hjá Vágatunlinum hava tey úr at gera við at avgreiða allar rokningarnar, sum liggja niðurfyri, nú alt skal umsitast manuelt.

Dungin er stórur, sigur Reinhold Isaksen, og tað ger atð eisini óarbeiðsligt og seinkandi, og ikki ber til at siga, nær tey vera komin uppundan, sigur hann.

Á skrivstovuni hjá Vágatunlinum hava tey ikki nágreinilig tøl fyri, hvussu nógvir bilar fara gjøgnum tunilin dagliga. Men teir eru heldur fleiri, enn roknað varð við av fyrstan tíð, heldur Reinhold Isakssen.

Teljari liggur uttan fyri tunnilin Vágamegin, og hann verður avlisin av fólki frá Landsverkfrøðinginum.

Hjá Landsverkfrøðinginum verður sagt, at seinasta avlesingin var 30. desember. Tað vil siga, at talan var um jólaferðslu, sum kanska kann vera eitt sindur misvísandi, um roknast skal við meðalferðslu fyri alt árið.

Endalig uppgerð var ikki gjørd, men roknað verður við, at einir 500-600 bilar ella so hava koyrt dagliga gjøgnum tunnilin um høgtíðirnar.

# Eiðis Kommuna fekk onga innbjóðing

**Eiðis Kommuna er ikki boðin við í kommunusamanleggingina í Norður Eysturoy og -Streymoy, sigur borgarstjórin á Eiði**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Edvard Joensen*

Størsta kommunan Norður Esturoy er ikki boðin upp í samstarvið um kommunusamanleggin í økinum.

Tordur Niclasen, borgarstjóri í Eiðis Kommunu, sigur, at hann hevur bara lisið í Sosialinum um kommunusamanleggingina, sum arbeitt verður við í Norður Eysturoy og Norður Streymoy fram við Sundalagnum. Sær vitandi er hvørki fyrispurningur ella beinleiðis innbjóðing komin til Eiðis Kommunu um at vera við í samstarvinum.

Borgarstjórin í Gjáar Kommunu, Sofus Johannesen, er ein teirra, sum arbeitt hevur við samanleggingini.

Hann sigur, at tað er rætt, at Eiðis Kommuna ikki hevur fingið slíka innbjóðing, tí talan er um tær kommunurnar, sum frammanundan hava verið við í tí sonevnda kommunufelagsskapinum við Sundalagið.

Bæði Eiðis Kommuna og Funnings Kommuna, sum heldur ikki er við nú, hava áður fingið innbjóðing um at koma upp í tað samtakið, vísir Sofus Johannesen á. Tað komu tær ikki, og tí hava tær heldur ikki fingið nakra innbjóðing nú, sigur hann.



*Eiðis Kommuna hevur onga innbjóðing fingið til kommunusamanlegging, sigur Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði. Tað er tí, at kommunan er boðin við í annað samstarv áður, men tók ikki av, siga fyrireikararnir*



# Verkfallið er av og skipini kunnu loysa



*Tey smærru nótaskipini eru á veg út úr flotanum til fyrimuns fyri størri og betri skip, og umborð á teimum størru nótaskipunum fær 2. stýrimaður eina betri hýru.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, Ellintur M. Abrahamsen, er rímiliga væl nøgdur við nýggja sáttmálan, sum varð undirskrivaður á Hotel Føroyum seint leygarkvøldið**

SEMJA
*Vilmund Jacobsen*

Verkfallið í fiskiskipaflotanum, sum Føroya Skipara- og Navigatørfelag lýsti, 18. desember, er av, og veiðiflotin kann nú leggja út á hav aftur.

Tað vóru fleiri sum væntaðu, at hetta fór at gerast eitt rættiliga tógvið stríð eftir, at so langt hevði verið millum partarnar, sum enn ikki vóru samdir um sjálvt samráðingargrundarlagið, tá ið samráðingarnar slitnaðu í desember. Men tíbetur fyri allar partar fekst ein loysn á trætuni nú um vikuskiftið.

Tað vóru semingsmenninir, sum kallaðu feløgini samanaftur at møta til fundar á Hotel Føroyum síðsta fríggjadag kl. 13.



*Ellintur M. Abrahamsen er sum heild nøgdur við nýggja sáttmálan, sum varð undirskrivaður á Hotel Føroyum, leygarkvøldið um 23-tíðina*

## Reiðararnir vrakaðu

Ellintur M. Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sigur, at fyrsta semingsuppskotið kom á borðið leygarmorgunin kl. 07.

- Vit góðtóku hetta uppskot, men reiðararnir vrakaðu tað, sigur hann.

Semingsmenninir, Høgni Høgnesen og Suni S. Jacobsen, settu feløgunum ta treyt ikki at úttala seg til fjølmiðlarnar um gongdina í samráðingunum. Tí frættist heldur ikki nógv um gongdina, fyrr enn avtalan varð undirskrivað.

- Klokkan 22.30 leygarkvøldið kom so seinna semingsuppskotið á borðið, og hesaferð góðtóku bæði feløgini uppskotið hjá semingsmonnunum. Um 23-tíðina hetta kvøldið varð nýggi sáttmálin so undirskrivaður á Hotel Føroyum, sigur ein hampiliga væl nøgdur, Ellintur.

Hann heldur ikki, at munurin á fyrra og seinna uppskotinum var serliga sjónligur, og tí undrast hann eitt sindur á, at reiðararnir blankt vrakaðu tað fyrra uppskotið, men tóku undir við tí seinna.

## Ellintur nøgdur

Ellintur sigur, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag sum heild er nøgt við nýggja sáttmálan.

Hann vísir á, at 2. stýrimaður á teimum smærru nótabátunum nú fær 1,375 part í mun til 1,25 part frammanundan, men hetta er so sambært tí, ið reiðararnir leggja í gamla sáttmálan.

- Sambært okkara sjónarmiðum áttu hesir at fingið 1,5 part eftir gamla sáttmálanum, men stríð hevur verið um henda spurningin síðan seinastu samráðingar, sigur Ellintur.

Hann leggur aftrat, at tey skip, sum eru fevnd av hesum sáttmála, eru nótaskip undir 1500 brt., og hesi eru á veg út úr flotanum til fyrimuns fyri størri og betri skip.

- Umborð á teimum størru nótaskipunum fær 2. stýrimaður nú 1,5 part ímóti 1,25 parti frammanundan. Men umborð á Krúnborg og Christiani í Grótinum fekk 2. stýrimaður frammanundan 1,5 part.

Ellintur sigur, at parturin hjá 1. stýrimanni er lækkaður úr 1,875 parti niður í 1,775, men nú er hesin sáttmálin galdandi fyri øll skip yvir 1500 brt., og tað heldur hann kortini er ein bati.

Umframt prosentini, sum togast hevur verið um, er tímalønin hjá yvirmonnum, sum arbeiða umborð ella í landi, meðan skipið er inni, dagførd, og tað er eisini ein bati.

## Skeiðvirksemi

Ellintur fegnast eisini um, at reiðararnir nú skulu gjalda fyri skeiðvirksemi hjá yvirmonnum.

- Skiparar og stýrimenn noyðast javnan á skeið, og nú er tað greitt í nýggja sáttmálanum, at tað verða reiðararnir, sum koma at gjalda fyri hesi skeiðini.

Hann vísir á, at talan er um GMDSS-skeið í radioútgerð, trygdarskeið og brandskeið, og somuleiðis er ein nýggj kunngerð komin um medisinkistur, sum eisini krevur, at í minsta lagi skipari og ein stýrimaður fara á skeið um hesi viðurskifti.

- Hetta er ein bati, sum kemur øllum til góðar, og frammanundan hava menn í fleiri førum verið noyddir sjálvir at rinda fyri slíkt skeiðvirksemi, sigur Ellintur.

Í nýggja sáttmálanum er eisini greiða fingin á sáttmálanum hjá yvirmonnum við trolarum, sum heilfrysta og hjá teimum, sum virka saltfisk og flak umborð.

- Enn eru nøkur ivamál, sum vit kortini ikki vildu gera meira burtur úr á hesum sinni, sigur formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, Ellintur M. Abrahamsen.

# Ikki so drúgt sum væntað

**Fiskiskapurin hevur verið ógvuliga góður í vetur, og tað er ikki óhugsandi, at hetta hevur skundað undir loysn av trætuni millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag**

SEMJA
*Vilmund Jacobsen*

Tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa fatur á formanninum í Føroya Reiðarafelag, áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár, men vit fáa væntandi eina viðmerking frá honum til blaðið mikudagin.

Í samrøðu við Útvarpið um vikuskiftið segði Jákup seg vegna reiðarafelagið ikki vera serliga væl nøgdan við nýggja sáttmálan, men vísti á, at felagið hevði valt at gera semjuna, soleiðis at skipini kunnu sleppa útaftur.

Bæði feløgini fegnast tó um, at leysir endar, sum stóðust av gamla sáttmálanum, nú eru fingnir uppá pláss.

## Grundarlagið

Undir samráðingunum, sum verið hava og eisini undir verkfallinum, ið hevur vart síðan, 18. desember, hevur verið tosað um skeivar orðingar og skrivifeilir í gamla sáttmálanum, og tað vóru í høvuðsheitum hesi viðurskifti, sum gjørdu, at torført var at finna eitt samráðingargrundarlag.

Men trætan er nú loyst, og tað munnu báðir partar og samfelagið alt fegnast um.

Skipini kunnu nú fara útaftur, og soleiðis sum veðrið er, gongur neyvan long tíð, til virksemi aftur verður í flakavirkisvinnuni á landi.

Fiskiskapurin hevur verið ógvuliga góður í vetur, og tað hevur kanska havt sína ávirkan á, at partarnir til tjúgund og síðst vístu góðan vilja til at loysa trætuna.